## Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 30. oktober 2019
Mál nr.: 19/00854
Málsviðgjørt:
Eftirkannað: 22. oktober 2019

**Løgtingsmál nr. 11/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum** (Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd)

# Uppskot til

# Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum
(Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, 2. pkt. verður " – grundupphædd – fødd aftaná 31. desember 1952," strikað.

2. Í § 3, nr. 1, 2. rað um grundupphædd til fólkapensjón - støk, verður "2016" broytt til: "2020" og "43.068,00" broytt til: "46.548,00".

3. Í § 3, nr. 1, 3. rað um grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør, verður "2016" broytt til: "2020" og "32.796,00" broytt til: "36.276,00".

4. Í § 3, nr. 1, 2. rað um grundupphædd til fólkapensjón – støk, verður "2020" broytt til: "2021" og "46.548,00" broytt til: 50.028,00".

5. Í § 3, nr. 1, 3. rað um grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør, verður "2020" broytt til: "2021" og "36.276,00" broytt til: "39.756,00".

6. § 3, nr. 1, 20. rað verður orðað soleiðis:
"

| | | |
|---|---|---|
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fólkapensjónistar | 2020 | 40.000,00 |

"

7. § 3, nr. 1, 21. rað verður strikað.

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2020.
*Stk. 2.* Tó koma § 1, nr. 4 og 5 í gildi 1. desember 2020 og hava virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2021.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Almennu viðmerkingarnar til hetta lógaruppskotið lýsa og samanbera broytingarnar í mun til lógina, soleiðis sum lógin er frá 1. januar 2020. Sonevnda pensjónsnýskipanin – sum snýr seg um nýggjar reglur um pensjón kemur í gildi 1. desember 2019, og hevur virknað fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2020.

Nýskipanin er galdandi fyri tey, sum blíva fólkapensjónistar aftaná ársskiftið 2019/2020, meðan tey, sum longu eru fólkapensjónistar, fáa pensjón eftir higartil galdandi reglum. Tó fáa verandi pensjónistar frá ársskiftinum møguleika at velja, um inntøka hjá hjúnafelaga skal takast við sum inntøkugrundarlag í sambandi við mótrokning.

Í almennu viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið verða tey, sum eru fólkapensjónistar við ársenda 2019, nevnd *verandi pensjónistar*. Tey, sum blíva fólkapensjónistar í 2020 (ella seinni), vera nevnd *komandi pensjónistar*.

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið ynskir at betra fíggjarligu viðurskiftini hjá fólkapensjónistum og at gera treytirnar lagaligari hjá teimum fólkapensjónistum, sum hava inntøkur afturat pensjónini.

Eisini er tað eitt politiskt ynski at hækka grundupphæddina upp aftur á sama støði, sum hon var í 2015. Grundupphæddin varð lækkað við 580 kr. um mánaðin frá 1. januar 2016, samstundis sum útgjaldið úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (AMEG) varð hækkað.

Hetta lógaruppskotið er partur av einum lógarpakka, sum samanlagt broyta fíggjarligu viðurskiftini hjá fólkapensjónistum. Talan er um tvey onnur lógaruppskot, sum eru:

- uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.,
- uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti.

Hetta uppskotið fevnir um hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríu inntøkuupphæddini, men fyri at lýsa avleiðingarnar og virknaðin av hesi lógarbroytingini, er neyðugt at taka hini bæði lógaruppskotini við í lýsingina.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*1.2.1. Grundupphædd*

Fólkapensjón er sett saman av eini grundupphædd og eini viðbót. Harumframt móttaka fólkapensjónistar eisini útgjald frá AMEG og viðbót til ávísar pensjónistar. Útgjald frá AMEG og viðbót til ávísar pensjónistar er ásett í aðrari lóggávu.

Síðani 1999 (tá verandi almannapensjónslóg varð sett í gildi) hevur grundupphæddin verið útgoldin uttan mun til fíggjarligu viðurskiftini hjá tí, ið fær pensjón, og reglurnar um mótrokning í grundupphæddini vóru strikaðar, soleiðis at tað ikki longur verður mótroknað í mun til inntøku. Samstundis varð grundupphæddin gjørd skattafrí – og semja var eisini gjørd um, at grundupphæddin verður ikki javnað.

Frá 1999 til 2016 var grundupphæddin 50.028 kr. um árið til ógift og 39.756 kr. um árið til gift. 1. januar 2016 lækkaði grundupphæddin við 6.960 kr. um árið, svarandi til 580 kr. um mánaðin.

Grundupphæddin, sum er skattafrí, er sambært galdandi lóg 3.589 kr. um mánaðin til ógift og 2.733 kr. um mánaðin til gift.

Talva 1 niðanfyri vísir inntøku hjá verandi fólkapensjónistum, sum ikki hava inntøku aftrat pensjónini.

**Talva 1. Inntøka í 2020 hjá verandi fólkapensjónistum, sum ikki hava inntøku aftrat pensjónini**

| | Um árið | | Um mánaðin | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Ógift* | *Gift* | *Ógift* | *Gift* | |
| Grundupphædd | 43.068 | 32.796 | 3.589 | 2.733 | Skattafrítt |
| Viðbót | 45.252 | 36.372 | 3.771 | 3.031 | Skattskyldugt |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 | Skattafrítt |
| AMEG | 68.880 | 68.880 | 5.740 | 5.740 | Skattskyldugt |
| **Inntøka áðrenn skatt** | **164.808** | **141.852** | **13.734** | **11.821** | |
| Skattur og gjøld í alt | 28.734 | 24.995 | 2.353 | 2.083 | |
| **Inntøka eftir skatt og gjøld** | **136.574** | **116.857** | **11.381** | **9.738** | |

*Viðm.: Roknað verður við miðal kommunu- og kirkjuskattaprosenti 2019 og eisini er gjald til Heilsutrygd og kringvarpið trekt frá.*

Grundupphæddin og útgjald frá AMEG verða útgoldin uttan mun til inntøku. Allir ógiftir fólkapensjónistar fáa sostatt útgoldið tilsamans 9.329 kr. um mánaðin, harav 3.589 kr. eru skattafríar, uttan mun til, hvat inntøka teirra annars er. Hjá teimum, ið eru gift, er upphæddin tilsamans 8.473 kr. um mánaðin, harav 2.733 kr. eru skattafríar. Tað skal tó nevnast, at tey, sum móttaka brotpensjón, fáa bert lutvísa pensjón í Føroyum, og upphæddir, sum tey móttaka, kunnu tí vera lægri.

Harumframt sleppa allir fólkapensjónistar undan at gjalda arbeiðsmarknaðargjøld, sum er gjald til arbeiðsloysistrygging, barsilsskipan og AMEG, sum tilsamans er 4,96% av skattskyldugari inntøku.

Við løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018 er grundupphæddin broytt soleiðis, at hon verður treytað av inntøku. Broytingin verður tó bert galdandi fyri komandi pensjónistar, t.v.s. frá 1. januar 2020. Grundupphæddin hevur sostatt ymiskan týdning fyri ávikavist verandi og komandi pensjónistar. Verandi pensjónistar móttaka grundupphæddina uttan mun til inntøku og fíggjarviðurskifti annars, meðan hjá komandi pensjónistum lækkar grundupphæddin í sambandi við inntøku, sum kemur aftrat pensjónini og útgjald frá AMEG.

Talva 2 niðanfyri vísir inntøku hjá komandi fólkapensjónistum, sum ikki hava inntøku aftrat pensjónini.

**Talva 2: Inntøka í 2020 hjá fólkapensjónistum, sum ikki hava inntøku aftrat pensjónini (komandi pensjónistar)**

| | Um árið | | Um mánaðin | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Ógift* | *Gift* | *Ógift* | *Gift* | |
| Grundupphædd | 43.068 | 32.796 | 3.589 | 2.733 | Skattafrítt |
| Viðbót | 57.348 | 36.372 | 4.779 | 3.537 | Skattskyldugt |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | - | - | - | - | Skattafrítt |
| AMEG | 68.880 | 68.880 | 5.740 | 5.740 | Skattskyldugt |
| **Inntøka áðrenn skatt** | **169.296** | **144.120** | **14.108** | **12.010** | |
| Skattur og gjøld í alt | 32.637 | 27.215 | 2.720 | 2.268 | |
| **Inntøka eftir skatt og gjøld** | **136.659** | **116.905** | **11.388** | **9.742** | |

*Viðm.: Roknað verður við miðal kommunu- og kirkjuskattaprosenti 2019 og eisini er gjald til Heilsutrygd og kringvarpið trekt frá*

Í mun til verandi pensjónistar er tað hjá komandi pensjónistum bara útgjald frá AMEG, sum verður útgoldið uttan mun til inntøku.

At grundupphæddin hjá verandi pensjónistum verður útgoldin uttan mun til inntøku hevur við sær, at verandi pensjónistar við høgum inntøkum, hava nakað hægri inntøku eftir skatt enn komandi pensjónistar við høgum inntøkum.

*1.2.1. Frádráttarfrí inntøkuupphædd*

Frádráttarfrí inntøkuupphædd er tað, sum fólkapensjónistar kunnu hava av inntøku, uttan at fólkapensjónin lækkar. Hjá verandi pensjónistum er upphæddin 61.900 kr., meðan hjá komandi pensjónistum er upphæddin 60.000 kr.

Tá inntøkan fer upp um hesar upphæddir byrjar fólkapensjónin at lækka. Hjá verandi pensjónistum er tað bara viðbótin, sum lækkar. Hjá komandi pensjónistum lækkar fyrst grundupphæddin og síðani viðbótin.

Meginreglan, sum er galdandi fyri verandi fólkapensjónistar, er, at fíggjarstøðan hjá hjúnum verður viðgjørd samlað, og at inntøka, sum ein giftur fólkapensjónistur hevur aftrat fólkapensjón og útgjaldi frá AMEG, verður mótroknað í pensjónsviðbótini hjá hjúnafelaga. Ein pensjónistur, sum ikki hevur inntøku, kann sostatt missa rættin til viðbót, tí hjúnafelagin hevur inntøku.

Í § 19, stk. 1 í almannapensjónslógini er ásett at, *viðbótin til giftan fólkapensjónist verður, tá bæði fáa fólkapensjón, lækkað við grundarlagi í helvtini av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum tilsamans*. Í praksis merkir hetta, at eini hjún kunnu hava inntøku á tilsamans 123.800 kr. um árið, áðrenn mótrokningin byrjar. Hvussu inntøkan er býtt millum hjúnafelagarnar hevur ikki týdning, og tað merkir t.d., at ein giftur fólkapensjónistur kann hava inntøku upp til 123.800 kr. uttan at blíva mótroknaður, um so er, at hjúnafelagin ikki hevur inntøku.

Frá ársskiftinum kunnu verandi fólkapensjónistar velja, um mótroknast skal millum hjúnafelagar. Tað er soleiðis, at nakrir pensjónistar hava fyrimun av at varðveita mótrokningina, hetta tí at hjúnini tilsamans kunnu hava hægri inntøku, áðrenn mótrokningin byrjar.

Tað er serliga hjá teimum, har inntøkan er ójavnt býtt millum hjúnafelagarnar, at tað er ein fyrimunur at varðveita mótrokning millum hjún. Ein pensjónistur, sum er á arbeiðsmarknaðinum, og sum er giftur við einum pensjónisti, sum ikki hevur inntøku, kann brúka mótrokningarfríu upphæddina hjá hjúnafelagnum. Men er samlaða inntøkan nóg høg, so loysir tað seg tó at strika mótrokningina millum hjún.

Við verandi lóggávu er markið fyri, at tað loysir seg at varðveita mótrokningina ein inntøka á uml. 180.000 kr. Hjá einum pensjónisti, sum hevur árliga inntøku á 180.000 kr., og sum er giftur við einum pensjónisti, sum ikki hevur inntøku, loysir tað seg tískil at varðveita mótrokning millum hjún.

Hjá pensjónistum, sum ikki hava inntøku aftrat fólkapensjón og útgjaldi frá AMEG, og hjá teimum, sum bert hava smávegis av inntøku er ongin munur á, um teir eru verandi ella komandi pensjónistar. Inntøkan eftir skatt og gjøld er nærum tann sama.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við samlaða lógapakkanum er at hækka inntøkuna hjá øllum fólkapensjónistum, og at lækka mótrokningina soleiðis, at tað fer at loysa seg betur fíggjarliga at arbeiða.

Hetta lógaruppskotið fevnir um hækking av grundupphæddini og lækking av frádráttarfríu inntøkuupphæddini.

Grundupphæddin verður hækkað til somu upphædd, sum hon var árini 1999-2015. Við hesum lógaruppskoti verður byrjað fyrr at lækka fólkapensjónina, tí frádráttarfría markið lækkar úr 60.000 kr. niður til 40.000 kr. Hóast markið fyri mótrokning lækkar, so er ongin pensjónistur, sum fer at missa nakað við broytingini, tí samstundis verður grundupphæddin hækkað, og fólkapensjónistar fáa eisini ein frádrátt í skattinum. Frádrátturin í skattinum verður framdur við broyting í løgtingslóg um áseting av skatti.

Endamálið við broytingunum er sum nevnt at hækka tøku inntøkuna hjá fólkapensjónistum. Fyrsta árið hækkar inntøkan ikki líka nógv, tí grundupphæddin hækkar við hálvari upphædd í 2020 og við fullari upphædd í 2021. Viðmerkingarnar í hesum uppskoti snúgva seg tískil fyrst og fremst um, hvussu avleiðingarnar verða, tá allar broytingarnar eru farnar at virka.

Tey, sum fáa mest burturúr fáa uml. 2.400 kr. um mánaðin, meðan tey, sum fáa minst, fáa uml. 850 kr. um mánaðin, tá allar broytingarnar eru farnar at virka. Hjá teimum, sum fáa brotpensjón, kann hækkingin tó verða minni.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við hesum lógaruppskoti hækkar grundupphæddin, og frádráttarfría inntøkuupphæddin lækkar. Samstundis verða gjørdar aðrar lógarbroytingar, har mótrokningarprosentið lækkar, og fólkapensjónistar fáa ein frádrátt í skattinum. Uppskotini tilsamans hava fyrst og fremst við sær eina inntøkuhækking til allar fólkapensjónistar, tá allir lutir í uppskotunum hava fingið virknað. Komandi pensjónistar fara at fáa hægri pensjón, enn lagt er upp til lógini, sum fær virknað við ársskiftið.

At grundupphæddin hækkar merkir, at inntøkan hjá øllum fólkapensjónistum, sum ikki hava inntøkur aftrat pensjónini, hækkar við 580 kr. um mánaðin (frá 1. januar 2021). Harumframt fáa fólkapensjónistar sum frá líður ein frádrátt í skattinum á 500 kr. um mánaðin (250 kr. í 2020 og 250 kr. aftrat í 2021), soleiðis at samlaða inntøkan hækkar við 1.080 kr. um mánaðin.

**Talva 3. Inntøka hjá verandi fólkapensjónistum, sum ikki hava inntøku aftrat pensjónini, tá allur lógapakkin hevur fingið virknað.**

| | Uttan broyting | | Við broyting | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Ógift* | *Gift* | *Ógift* | *Gift* | |
| Grundupphædd | 43.068 | 32.796 | 50.028 | 39.756 | Skattafrítt |
| Viðbót | 45.252 | 36.372 | 45.252 | 36.372 | Skattskyldugt |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 7.608 | 3.804 | Skattafrítt |
| AMEG | 68.880 | 68.880 | 68.880 | 68.880 | Skattskyldugt |
| **Ársinntøka áðrenn skatt** | **164.808** | **141.852** | **171.768** | **148.821** | |
| Skattur og gjøld í alt | 28.734 | 24.995 | 22.234 | 18.995 | |
| **Innt. ár eftir skatt og gjøld** | **136.574** | **116.857** | **11.381** | **129.817** | |
| **Innt. mánað eftir skatt og gjøld** | **11.381** | **9.738** | **12.461** | **10.818** | |
| **Munur um mánaðin** | | | **1.080** | **1.080** | |

*Viðm.: Roknað verður við miðal kommunu- og kirkjuskattaprosenti 2019 og eisini er gjald til Heilsutrygd og kringvarpið trekt frá.Útgjald frá AMEG er upphædd galdandi í 2020.*

**Talva 4: Inntøka hjá fólkapensjónistum, sum ikki hava inntøku aftrat pensjónini (komandi pensjónistar), tá allur lógapakkin hevur fingið virknað.**

| | Uttan broytingar | | Við broytingum | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Ógift* | *Gift* | *Ógift* | *Gift* | |
| Grundupphædd | 43.068 | 32.796 | 43.068 | 32.796 | Skattafrítt |
| Viðbót | 57.348 | 36.372 | 57.348 | 36.372 | Skattskyldugt |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | - | - | - | - | Skattafrítt |
| AMEG | 68.880 | 68.880 | 68.880 | 68.880 | Skattskyldugt |
| **Ársinntøka áðrenn skatt** | **169.296** | **144.120** | **176.256** | **151.080** | |
| Skattur og gjøld í alt | 32.637 | 27.215 | 26.637 | 21.215 | |
| **Innt. ár eftir skatt og gjøld** | **136.659** | **116.905** | **149.619** | **129.865** | |
| **Innt. mánað eftir skatt og gjøld** | **11.388** | **9.742** | **12.468** | **10.822** | |
| **Munur um mánaðin** | | | **1.080** | **1.080** | |

*Viðm.: Roknað verður við miðal kommunu- og kirkjuskattaprosenti 2019 og eisini er gjald til Heilsutrygd og kringvarpið trekt frá*

Frádráttarfría inntøkuupphæddin lækkar úr 61.900 kr. og 60.000 kr. (ávikavist verandi- og komandi pensjónistar) niður til 40.000 kr. Frameftir verður tað ein og sama upphædd fyri bæði verandi- og komandi pensjónistar. At markið lækkar úr 60.000 kr. niður til 40.000 kr. merkir, at tey við inntøkugrundarlag millum 40.000 kr. og 60.000 kr. frameftir verða mótroknað, men hesi fara tó ikki at fáa lægri inntøku enn við galdandi skipan, tá allar broytingarnar í hesum lógapakka hava fingið virknað. Hetta er orsakað av hækkaðu grundupphæddini og frádráttinum í skattinum.

Avleiðingarnar fyri fólkapensjónistar, sum hava inntøkugrundarlag hægri enn 40.000 kr., skulu síggjast saman við broytingunum í mótrokningarprosentinum, sum er ásett í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Talvurnar niðanfyri vísa, hvussu broytingarnar ávirka fólkapensjónistar við ymiskum inntøkum. Talvurnar vísa, hvussu inntøkurnar broytast, tá lógarpakkin hevur fingið fullan virknað, og tá hædd er tikin fyri skatti og øllum tvungnum gjøldum. Hædd er tó ikki tikin fyri javning í 2021.

**Talva 5: Inntøka um mánaðin eftir skatt og gjøld – ógiftur**

| Inntøku-grundarlag | Verandi pensjónistar | | | Komandi pensjónistar | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Galdandi | Broytt lóg | Munur | Galdandi | Broytt lóg | Munur |
| 0 | 11.381 | 12.461 | 1.080 | 11.388 | 12.468 | 1.080 |
| 50.000 | 14.032 | 15.006 | 974 | 14.039 | 14.952 | 913 |
| 100.000 | 14.837 | 16.492 | 1.655 | 15.856 | 16.769 | 913 |
| 150.000 | 16.301 | 18.583 | 2.282 | 17.293 | 18.414 | 1.122 |
| 200.000 | 18.811 | 20.536 | 1.725 | 18.693 | 20.023 | 1.330 |
| 250.000 | 21.253 | 22.490 | 1.237 | 19.954 | 21.439 | 1.485 |
| 300.000 | 23.533 | 24.613 | 1.080 | 21.294 | 22.917 | 1.623 |
| 350.000 | 25.767 | 26.847 | 1.080 | 22.634 | 24.704 | 2.070 |
| 400.000 | 28.001 | 29.081 | 1.080 | 24.412 | 26.491 | 2.079 |
| 450.000 | 30.234 | 31.314 | 1.080 | 26.646 | 28.278 | 1.633 |
| 500.000 | 32.468 | 33.548 | 1.080 | 28.879 | 30.065 | 1.186 |
| 550.000 | 34.702 | 35.782 | 1.080 | 31.113 | 31.852 | 739 |
| 600.000 | 36.936 | 38.016 | 1.080 | 33.347 | 33.847 | 500 |
| 650.000 | 39.169 | 40.249 | 1.080 | 33.347 | 33.847 | 500 |

**Talva 6: Inntøka um mánaðin eftir skatt og gjøld – giftur (ongin mótrokning)**

| Inntøku-grundarlag | Verandi pensjónistar | | | Komandi pensjónistar | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Galdandi | Broytt lóg | Munur | Galdandi | Broytt lóg | Munur |
| 0 | 9.738 | 10.818 | 1.080 | 9.742 | 10.822 | 1.080 |
| 50.000 | 12.388 | 13.362 | 974 | 12.392 | 13.306 | 913 |
| 100.000 | 13.511 | 15.166 | 1.654 | 14.210 | 15.123 | 913 |
| 150.000 | 15.445 | 17.286 | 1.841 | 15.709 | 16.830 | 1.122 |
| 200.000 | 17.955 | 19.247 | 1.293 | 17.123 | 18.439 | 1.316 |
| 250.000 | 20.397 | 21.477 | 1.080 | 18.556 | 20.006 | 1.450 |
| 300.000 | 22.677 | 23.757 | 1.080 | 19.944 | 21.793 | 1.849 |
| 350.000 | 24.911 | 25.991 | 1.080 | 22.178 | 23.580 | 1.402 |
| 400.000 | 27.145 | 28.225 | 1.080 | 24.412 | 25.367 | 956 |
| 450.000 | 29.378 | 30.458 | 1.080 | 26.646 | 27.154 | 509 |
| 500.000 | 31.612 | 32.692 | 1.080 | 28.879 | 29.379 | 500 |

*Viðm.: Verandi pensjónistar eru í hesi talvuni tey, sum velja, at ongin mótrokning skal vera millum hjúnafelagar*

Talva 7 niðanfyri vísir broytingarnar hjá fólkapensjónistum, sum velja, at mótroknast skal millum hjúnafelagar. Talvan skal lesast á annan hátt enn talvurnar omanfyri, tí hjá hesum bólkinum skal inntøkan altíð leggjast saman, og síðani verður mótroknað. T.d. um inntøkugrundarlagið er 300.000 kr., er talan um inntøkurnar hjá báðum tilsamans. Tað kann vera, at annar hjúnafelagin hevur alla inntøkuna og hin onga, ella tað kann vera annað býti.

**Talva 7: Inntøka um mánaðin eftir skatt og gjøld – giftur (mótrokning)**

| Inntøku-grundarlag | Verandi pensjónistar | | |
|---|---|---|---|
| | Galdandi | Broytt lóg | Munur |
| 0 | 9.738 | 10.818 | 1.080 |
| 50.000 | 12.388 | 13.468 | 1.080 |
| 100.000 | 14.722 | 15.696 | 974 |
| 150.000 | 16.906 | 18.026 | 1.121 |
| 200.000 | 18.615 | 20.224 | 1.609 |
| 250.000 | 20.397 | 22.388 | 1.991 |
| 300.000 | 22.677 | 24.398 | 1.721 |
| 350.000 | 24.911 | 26.409 | 1.498 |
| 400.000 | 27.145 | 28.419 | 1.274 |
| 450.000 | 29.378 | 30.458 | 1.080 |
| 500.000 | 31.612 | 32.692 | 1.080 |

*Viðm.: Grundarlagið undir talvuni er, at annar hjúnafelagin hevur alla inntøkuna, meðan hin onga inntøku hevur. Um inntøkan t.d. hevði verið býtt javnt millum hjúnafelagarnar, verður úrslitið eitt sindur øðrvísi orsakað av, at skattaprosentið broytist nakað. Í dømunum í talvu 6 hækkar inntøkan hjá báðum.*

Talvan niðanfyri vísir, hvussu høg inntøkan er, tá pensjónin er fult mótroknað (tá lógapakkin hevur fingið fullan virknað).

**Talva 8: Yvirlit yvir, hvussu høg inntøkan skal vera, tá fólkapensjónin er fult mótroknað**

| | **Galdandi** | **Broyting** |
|---|---|---|
| *Verandi – ógiftur* | 137.320 | 266.260 |
| *Verandi - giftur, ongin mótrokning millum hjún* | 122.520 | 221.860 |
| *Verandi - giftur, mótrokning millum hjún** | 245.040 | 443.720 |
| *Komandi - ógiftur* | 375.640 | 576.880 |
| *Komandi - giftur* | 297.290 | 451.000 |

**Viðm.: Upphæddin er inntøka hjá hjúnunum tilsamans.*
*Viðm.: Hjá verandi pensjónistum er tað bara viðbótin, sum verður mótroknað, meðan hjá komandi pensjónistum verður bæði grundupphædd og viðbót mótroknað.*

Pensjónsnýskipanin ger tað møguligt undir ávísum treytum at útseta pensjónina og afturfyri fáa hægri pensjón seinni. Hesin møguleiki verður bara galdandi fyri komandi pensjónistar. Hjá teimum, sum hava somikið høga inntøku, at øll pensjónin er mótroknað, vil tað altíð loysa seg at útseta pensjónina. Sostatt hevur pensjónisturin onki at missa, tí hann fær onga pensjón kortini (hann fær tó altíð útgjald frá AMEG, sum ikki kann útsetast). Eisini hjá teimum, sum hava inntøku, sum er somikið høg, at meginparturin av pensjónini er mótroknað, kann tað loysa seg at útseta pensjónina.

Hækkaða grundupphæddin og broytingarnar við mótrokningini hava við sær, at inntøkan skal vera munandi hægri, áðrenn fólkapensjónin er fult mótroknað. Hetta fer sannlíkt at hava við sær, at tað verða færri pensjónistar, sum fara at útseta pensjónina.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis vegna stutt skotbrá.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað eru gott 8000 fólkapensjónistar, sum frá 1. januar 2020 fara at fáa rætt til 290 kr. meira um mánaðin í grundupphædd. Kostnaðurin av hesum verður uml. 28 mió. kr. fyrsta árið. Komandi árini verða nakrir pensjónistar, sum ikki fara at fáa rætt til grundupphæddina, tí inntøka teirra er ov høg, men samstundis økist samlaða talið av fólkapensjónistum. Tískil er trupult at meta samlaðu útreiðslurnar árini frameftir.
Løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018, sum fær virknað frá 1. januar 2020, inniheldur eina røð av broytingum – m.a. um mótrokning millum hjún, útsetta pensjón, viðbót til ávísar pensjónistar er strikað og mótrokningarprosentið lækkar.

Sambært Fíggjarmálaráðnum fer tað leysliga mett at hava við sær, at útreiðslur til fólkapensjón hækka við 20 mió. kr. um árið. At fleiri fara at fáa hægri viðbót, hevur við sær øktar skattainntøkur fyri land og kommunur.

Men um samlaðu broytingarnar fara at økja ella minka um arbeiðsvirknið hjá komandi pensjónistum, hevur ikki verið mett um. Um arbeiðsvirknið økist, hækka skattainntøkurnar, og útreiðslur til viðbót lækka. Um arbeiðsvirknið minkar, eru avleiðingarnar øvugtar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri land og kommunur. Broytingarnar hava tó við sær nakað av útreiðslum í sambandi við tillagingar í kt-skipanini hjá Almannaverkinum. Talan er um útreiðslur, sum verða hildnar innan verandi fíggjarkarm.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Tað er trupult at meta um, hvørjar avleiðingar lógaruppskotið hevur fyri vinnuna.

Um arbeiðsvirknið økist hjá fólkapenjónisti, tí tað betur loysir seg at arbeiða, verða fleiri eldri á arbeiðsmarknaðnum.

Um fólkapensjónistur fer at arbeiða minni, tí fólkapensjónin hækkar, og mótrokningin lækkar, verða færri fólkapensjónistar á arbeiðsmarknaðinum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Tá allar broytingarnar hava fingið virknað, fara inntøkurnar hjá øllum fólkapensjónistum at hækka við hesum lógaruppskoti, og uppskotið hevur sostatt við sær jaligar avleiðingar fyri fólkapensjónistar. Hvussu nógv inntøkurnar hækka sæst í talvunum 5, 6 og 7 í kap. *1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum*

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Hetta lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Tá alsamst størri partur av inntøkugrundarlagnum hjá pensjónistum verður stýrdur av skattareglum um frádrátt og skattafrítøku, kann tað hava munandi markaforðingar við sær, tí við flyting til onnur lond kann verða, at hetta verður skattað øðrvísi eins og skattafrádrátturin í Føroyum ikki kann nýtast, og harvið minkar virðið á pensjónini meira, enn um viðkomandi býr í Føroyum. Í september 2019 vóru tað 237 pensjónistar, sum búgva uttanlands og fáa fulla ella brotfólkapensjón úr Føroyum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovnar ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**

Lógarbroytingin hevur við sær, at grundupphæddin til fólkapensjón sambært hesi lóg fyri stakar pensjónistar í 2020 hækkar úr kr. 43.068,00 til kr. 46.548,00 árliga og fyri giftar pensjónistar úr kr. 32.796,00 til kr. 36.276,00 árliga. Í 2021 hækka upphæddirnar til støk úr kr. 46.548,00 kr. til kr. 50.028,00 kr., og til gift úr kr. 36.276,00 til kr. 39.756,00.

Frádráttarfría inntøkuupphæddin lækkar úr ávikavist kr. 61.900,00 og 60.000,00 niður á kr. 40.000,00 árliga, galdandi fyri allar fólkapensjónistar. Samstundis verður munurin á javningini á frádráttarfríu inntøkuupphæddini millum fólkapensjónistar sbrt. verandi skipan og nýskipan strikaður.

**Til § 2**
Gildiskoma. Við hesum uppskoti hækkar grundupphæddin við 290 kr. frá 1. januar í 2020 og aftur við 290 kr. frá 1. januar 2021.

Almannamálaráðið, 30. oktober 2019

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur